EG MEINI TA ‹

Petur Rouch, útvarps-vertur í »Rót og rútmu«

Roykipolitikkur

Ta› er mánamorgun um tiggjutí›ina, og eg fari at vitja gasskamari›. Vit hava sjálvandi ein roykipolitikk í st‡rinum, har eg arbei›i, og onkur skemtilig sál hevur fest eitt uppslag á ta› rúmi›, í› annars nevnt ver›ur roykirúmi›, "Gasskamar — entry at own risk!" ljó›ar ávaringin úr einum tekna›um roykt ámi›.

Her sita vit so - tey fáu ófrelstu í húsinum — og súgva okkara vindlar, okkara dagligu dosis av nikotini fyri at koma ígjøgnum dagin. Ein skuldi trú›, at hetta var eitt serligt rúm — kanska ljóst og luftigt vi› serligari útlufting. Men so ei›asørt, í grundini n‡tist bara helvtin av okkum at roykja, restin kan bara anda inn.

Ikki tí, sjálvur vil eg helst leggja av at roykja. Ta› er neyvan naka› gagnligt, d‡rt er ta› eisini, men ringast av øllum, roykjandi fólk hava alt meira fingi› eina paria-líknandi stø›u í samfelagnum. Ein skuldi næstan trú›, at øll sjúka helt uppat, bara tubbakki› hvarv.

Men ringt er at leggja av, ringari enn ein skuldi trú›. Ein lorta last.

Hvar er í grundini munurin millum last og sjúku? Sótu vit solei›is vi› einum dropa og javna›u ein mánamorgun, høvdu vit veri› flutt á Velbasta› vi› fullum útrykningi, me›an læknar, sjúkrasystrar og anna› gott fólk hev›i sta›i› klárt at taka ímóti okkum. Og vit høvdu fingi› alla møguliga hjálp til at veri› slúsa› út í samfelagi› aftur.

Men nikotintrælir? Ga'vekk, sum su›ringurin seg›i, tykur kunja bara halda uppat! Er ongin viljastyrki í tykum?

Sjónvarpsreklamurnar á TV3 siga seg kunna hjálpa okkum. Tyggigummi›, kunstigar sigarrettir og heftiplástur. Ta› er loysnin, ver›ur sagt, »for jeg SKAL faktisk ikke ryge«, sigur hin n‡frelsti í reklamuni.

Sjálvur tendri eg hvørki uppá heftiplástur ella plastikk í munninum. Men tyggigummi kanska.

Lukkuliga óvitandi um handilslig prinsipp fari eg á apoteki› at keypa mær nikotintyggigummi. Eg havi lært meg ramsuna uttanat: »30 stykkir, 2 milligram, uttan smakk, takk«. »Ger so væl, ta› ver›ur 61 krónur«, sigur tann fryntliga gentan aftan fyri diskin.

61 krónur? Ta› ver›ur meira enn 2 krónur fyri hvørt tyggigummi›. Og ta› kann ikki ver›a nikotinúrdrátturin, tí 4 milligram kosta líti› meira. Og sjálvt tyggigummi› er neyvan betur enn Stimorol ella Wrigley's. Kundi kanska keypt 4 milligram og skori› hvørt tyggigummi› sundur í helvt? Hvat man vinningurin solei›is í prosentum vera av hesum tyggigummi? Eg fati knappliga eina djúpri meining vi› I‡singunum og her›fer›ini hjá apotekunum um at halda uppat at roykja og havi ein illgruna um, at teir ísta›in ætla at gera meg til nikotintyggigummitræl.

Teir 10 minuttirnar eru farnir. Eri kvikur, tá eg smoyggi mær útum, tí onginroykur má koma út á gongina. Passiv royking er minst líka farlig, sigist klóku. Í grundini eru eg og tey, eg vaks upp saman vi›, medisinsk vidundir, tí bara fá áttu at veri› eftir á lívi vi› øllum stórroykjarum, í› vóru í okkara uppvøkstri. Sjálvt úr skúlastovuni minnist eg enn henda frísk-liga pípuroykin hjá bæ›i lærara og presti.

Óansæ› hvussu nógv fyrilit vit roykjarar taka til okkara me›menniskju, so ver›ur lastin ælt meira — ja, belastandi. Tí ver›ur mítt uppskot – og ta› er í fullum álvara – at tubbak ver›ur forbo›i›. So kann focus setast á a›rir bólkar, salamifjepparar ella tvøst-og-spik-ætarar, tey morgunsúru ella kanska nasapilkarar.

»You're still gonna die«, sigur Shel Silverstein onkusta›ni. Livst, so spyrst — nei forrestin, ta› kann eg heldur ikki rokna vi›.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Bla›stjórn: Eirikur Lindenskov

Hattin av fyri Jakkanum

Nøkur ár eru nú sí›ani, at vágabólkurin Tinganest setti var›ar í føroyskum tónleiki. Men ein av oddamonnunum úr bólkinum roynir seg nú á egnum beinum, stígur í stórum á tá, og kemur væl frá tí, uttan at missa fótafesti ›

TÓNLEIKAUMRØ‹A
Dagfinn Olsen

Til Prix Føroyar tiltaki› í ár hava vit nakrar fer›ir hoyrt um fyribrigdi› »Vágasound«, henda serstaka ljómin. Undangongumenninir í hesum, mundu helst vera manningin í Tinganest, sum í áttatiárunum vóru sera virknir. Teir eiga óiva› enn sessin, sum fremsti bólkur, i› Vágoyggin fostra›i. Seinni komu a›rir vágabólkar, T. d. Bims, Sørvings og Hips um Haps, haldi eg teir kalla›ust. Eisini har gekk Tinganest aftur.

Jóan Jakku Guttesen var rey›i trá›urin í nøkrum av bólkunum, eins og ein av høvu›smotorunum í Tinganest. Ma›urin er fyrst og fremst kendur sum tónleikari, tó at hann eisini hevur roynt seg sum høvund og eigur onkra stuttsøguna, i› er komin út í bók.

Nú roynir Jóan Jakku Guttesen seg á egnum beinum, vi› solofløgu, nevnd Jakkin.

At umrø›a hesa fløgu er torført. Og ta› hevur einki vi› gó›skuna at gera, tí hetta er ein fløga, i› leggur so mangar a›rar aftan fyri seg.

Jóan Jakku er farin í samstarv vi› gó›ar tónleikarar. Terji Rasmussen hevur tiki› upp og produsera›, eins og hann leikar á fløguni. Hinir tónleikararnir eru Tróndur Bogason Hansen, Leivur Thomsen, Rógvi á Rógvu og Signhild Dalsgaard. Annika B. Mortensen hevur gjørt húsan, i› Niels A. Galán greiddi til prentingar. Hjálparmenn vóru Rógvi á Rógvu, Jón McBirnie og Róin Siggertsson. Tutl gevur út.

Jóan Jakku, ein av monnunum, i› óiva› er upprunin til »Vágasound-i›«, hevur her megna› at dansa lættur á tá, minst eitt fet ví›ari. Á fløguni Jakkin er tí›in vi› Tinganest farin, fíla› burtur. Men ey›kendi Jóan Jakku er tó tann, hann altí› hevur veri›. Hevur megna› at skimast, fara ví›ari og tó hevur hann ikki mist seg sjálvan burtur.

Tey, i› vænta sær ein dans upp á tá, ella eina vágagellu, kunnu tó stíga í stórum til fán‡tis.

Jakkin er ein heild. Ein fløga, har ein bert hómar farnar tí›ir, framd brøgd. Fari› ver›ur ví›ari og komi› ver›ur í stórum fetum um bøgar›arnar. Jóan Jakku hevur longu bora› Vágatunnilin. Vi› honum kom soundi›, hitt kenda, men óiva› er nú eisini hol sett á, so n‡ggir vindar sleppa framat.

Vágagellan, ella hin, sum sang í Havnargøtum, eiga ikki innivist longur, men tónleikagla› eiga at fegnast um Jakkan. Ein fløga, vi› bæ›i kvæ›akendum løgum, íblástri frá Pink Floyd og kanska Dire Straits, hvør veit? Ein fløga vi› gó›um, gerandisligum og rámandi, vi›hvørt djúpum, tekstum.

Umrø›ari kann bert fegnast, um enn ein má taka ein gamlan sang hjá Tinganest til eftirtektar; í óvissu. Jóan Jakku er og ljó›ar sum Jóan Jakku. Anna› hev›i eisini veri› løgi›.

Men hann hevur skift Jakka. Eingin ivi um ta›. Veit ikki, um n‡ggja fløgan fær nakran sang í eina komandi grøna sangbók. Men hvør sigur, at ta› borgar f‡ri gó›sku í sjálvum sær? Eitt er tó víst. Her er samleikin var›veittur, men menning er farin fram, hattin av fyri Jakkanum. Skuldi eg givi› eitt tinganest (i› sum kunngt merkir gáva, ofta vi› heimkomu), so hev›i Jakkin hjá Jóan Jakku óiva› veri› í uppskoti›.

BARNA- OG UNGDÓMS GRAND PRIX: Vi› sanginum »Du er min kærlighed« fer bólkurin »Zabian Zoul« at royna at vinna danska barna- og ungdóms grandprixi›, sum ver›ur sent beinlei›is í DR1 í kvøld. Tónleikin hevur havnarma›urin Ey›finnur Jensen lagt til rættis

– Okkara sangur er tann stillasti

TÓNLEIKUR
Eirikur Lindenskov

Duettin, Ercan og Charlotte, sum í kvøld fara at luttaka í barna- og ungdóms Grand Prix í DR 1 saman vi› Ey›finni Jensen, lærara, úr Havn, sum hevur loagt tónleikin til rættis

Í kvøld kl 19:15 danska tí› sendir danska sjónvarpsrásin, DR1 barna- og ungdóms Melodi Grand Prix. Hetta er a›ru fer›, at skipa› ver›ur fyri slíkari kapping, sum nú ver›ur nevnd MGP 2001.

Í ár ver›ur serliga nógv gjørt burturúr – bæ›i tí, at tiltaki› eydna›ist so væl í fjør, og tí at altjó›a Melodi Grand Prix kappingin ver›ur í Danmark í ár.

Vertirnir í kappingini hesafer› eru Camilla Ottosen frá »Børne1eren« á Danmarks Radio og René Dif úr Aqua.

At talan er um vi›urkenda kapping kunnu nøvnini á gestunum ver›a borganin fyri, tí millum nøvnini eru Mel B úr Spice Girls, A One, dreingjaband úr Noreg, S.O.A.P. systrarnar, O-Town, sum eru kendir úr sjónvarpssendirø›ini »Drengebandet« og Rollo & King, sum vunnu danska Grand Prix fyrr í ár.

Í kappingini í fjør vóru fimm finalistar. Í ár ver›a teir tíggju. Tá var eisini skipa› fyri kappingini hósdag klokkan 15. At kappingin nú ver›ur send beinlei›is í bestu sendití› leygarkvøld skuldi borga› fyri, at Danmark Radio hevur stórar vónir til kappingina.

Skulu hita upp í Parkini

Allir bólkarnir, sum eru vi› í finaluni í kvøld, ver›a vi› á eini fløgu, sum ver›ur givin út vi› finaluløgunum. Vinnarin av kappingini fær eisini ein plátusáttmála vi› Virgin Music, sum er heimsins stórsta plátufelag. Harumframt skal vinnandi bólkurin eisini hita upp til eins sjónvarpshending í Danmark, tá sjónleikarin og undirhaldarin Søren Pilmark og Natasja Crone, journalistur og studiovertur fara at bjó›a øllum Evropa til vælkomnum til Melodi Grand Prix 2001, sum ver›ur í Parkini í Keypmannahavn fyri 35.000 áhoyrarum tann 12. mai.

Orsøkin til, at havnarma›urin, Ey›finn Jensen, er blanda›ur upp í danska barnagrandprixi› er, at hann einafer› hevur gjørt tónleik fyri gentuna í bólkinum, »Zabian Zoul«, sum eitur Charlotte.

– Eg eri vinma›ur lærarahennara, Søren, sum eg eisini havi arbeitt saman vi›, sigur Ey›finn Jensen.

– Ta› var ígjøgnum hann og eitt skúlaprojekt, at eg hitti hana fyrstu fer›.

Vald út millum yvir 1.000 onnur

Ey›finn Jensen sigur, at tá i› Charlotte og Ercan so ætla›u at fara vi› til Melodi Grand Prix, settu tey seg í samband seg.

– Tey høvdu saman vi› Sørini skriva› ein tekst og gjørt ein melodistubba, sum eg so arrangera›i og tók upp í studio okkara.

Og úrsliti› var gott, tí sangurin rakti tey hjørtu, hann skuldi raka.

– Vertir, produsarar og stjórar á DR og Virgin vóru øll samd um, at sangurin »Du er min kærlighed« skuldi vi›. Tey søgdu, at ta› var sera truppult at velja millum teir langt oman fyri 1.000 sangirnar, sum inn vóru komnir, grei›ir Ey›finn Jensen frá.

Eftir at Zabian Zoul kom vi› í finaluna, hava Ey›finn og Søren fylgt og hjálpt teimum allan vegin ví›ari.

- Tey flestu av hinum bólkunum hava havt onkran av foreldrunum vi› sum hjálparar. Vit kenna ábyrgd fyri teimum, og tá tey bæ›i bó›u okkum koma vi› út til DR til tann fyrsta fundin, so kundu vit ikki siga nei.

Ey›finn Jensen grei›ir frá, at tey hittu vertirnar, sum í stórum greiddu teimum frá, hvussu kappingin fer fram. Aftan á vóru tey á fundi vi› ein stjóra og ein produsara á Universal Music, sum greiddu teimum frá teirra leikluti, fløguni og høvu›svinninginum.

– Teir greiddu okkum eisini frá reglunum, sum m. a. siga, at allir sangirnir skuldu takast upp av gangsstø›i, sigur hann.

Føroyskur búnadesignari

– Upptøkurnar vór›i gjørdar saman vi› einum produsara hjá Universal, Christian Borregaard, og vit eru sera væl nøgd vi› úrsliti›, sigur hann.

Camilla Ottesen fra Børne1eren og René Dif úr Aqua ver›a vertir vi› barna- og ungdóms grandprixi› í DR í kvøld

n‡ggjum. Ta› er tí, at gó›skan ikki var tann sama á øllum upptøkunum, sum vóru komnar inn, og fyri at øll skulu hava sama útsigur Ey›finn Jensen.

Hann sigur eisini, at tey hava hitt stylistar, hava veri› til ta› tey kalla foto session og havt vitjan av fleiri tídindafólkum, v.m. Umframt hetta hevur DR veri› og tiki› myndir til ein filmstubba, sum verdur s‡ndur á skíggjanum beint á›renn tey skulu framføra sangin.

Sangurin hjá Zabian Zoul er ein sera romantiskur sangur, og tí skulu klæ›ini eisini hóska til, og til at hjálpa sær vi› hesum hava tey fingi› Benadiktu Kruse úr Havn. Hon hevur bæ›i designa› og seyma› teimum klæ›ini til sjálva finaluna. Benadikta er designari, og fleiri av hennara verkum hava veri› at sæ› á teimum donsku sjónvarpsskíggjunum í seinastuni. Hon hevur gjørt klæ›i til James Olsen, sum spælir saman vi› Eran DD.

Ey›finn metir, at møguleikarnir hjá Zabian Zoul at vinna kappingina eru á gó›ari lei›.

At sigur at sleppa vi ›

– Vit hava bert hoyrt brot úr hinum sangunum enn, men vit vita, at teir eru allir sera ymiskir, og at okkara er tann stillasti av teimum. Vit kunnu ikki gera anna› enn at venja og annars at fyrireika okkum so væl tilber. Ta› ver›ur so upp til siggjarnar og dómararnar at geva stigini í finaluni, men vit kenna ta› sum um, at vit longu hava vunni› ein sigur vi› at sleppa vi› til finaluna, sigur Ey›finn Jensen.

Hann dylur kortini ikki fyri, at tey sjálvandi vilja vinna.

– Vit eru longu farin í gongd vi› at gera fleiri sangir, so vit í øllum førum hava eitt útspæl klárt aftan á finaluna, um so vit vinna ella ikki, sigur hann.

Hann heldur, at tey í øllum førum hava fingi› nakrar gó›ar upplivingar og ikki so líti› av innliti í, hvussu stóra fyrireiking eitt slíkt tiltak krevur.

Hvussu leikur fer frætta vit um aftan á finaluna í kvøld…

Zabian Zoul: »Du er min kærlighed«

TÓNLEIKUR
Eirikur Lindenskov

Hóast Ercan og Charlotte frá Amager bera fram hugtakandi kærleikssangin, sum um tey onganti› hava gjørt anna›, so hittu tey ikki hvørt anna›, fyrr enn beint fyri jól.

Bæ›i vóru tey so at siga júst byrja› í sundbyøster Skole, Ercan í 8. flokki og Charlotte í 9., og tey kendu ikki hvørt anna›. men tey høvdu sama lærara í tónleiki, og hann fekk tey at syngja saman.

Uppruni teirra er rættuliga ymiskur, men felags fyri tey er, at tey altí› hava sungi›. Ercan fór longu at syngja, tá hann gekk í tri›ja flokki. Tá var hann til upptøkuroynd á tí musikalska skúlanum, Sankt Annæ Skole. Hann kom gjøgnum nálareyga›, Ein avger›, tey sí›an hava angra›.

Charlotte hevur eisini altí› sungi›, og pápi hennara spælir eisini í einum bólki. Hetta hevur smitta› Charlotte, i› sum 12-13 ára gomul var vi› í einum bólki.

Tá Ercan sá, at »MPG 2001 - Grand Prix fyri tey ungu«, søkti eftir luttakarum, fór hann at skriva ein sang, sum hann upprunaliga hev›i ætla› at sungi› einsamallur. Men tá hann so var farin at syngja saman vi› Charlotte, gekk ta› so væl til jólakonsertina á skúlanum, at tey vóru samd um at skriva ein sang saman. Og tá Ercan kom vi› einum tónleikastubba, skriva›u tey sangin lidnan upp á ein seinnapart - beint fyri deadline…

Vi› hjálp frá vinmanni sanglærara teirra, Ey›finn Jensen, hava tey so skapt sangin »Du er min kærlighed«, og í kvøld fáa vit so at síggja, hvussu leikur fer.